# Sosialurin VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 7. november 2003



CANAL+

**Kendir instruktørar: George Lucas**
Hann er millum teir størstu instruktørarnar og framleiðararnar í Hollywood. Hann hevur staðið aftanfyri Star Wars filmarnar og Indiana Jones. Her sigur hann sjálvur frá, um sítt suksessfulla lív og um, hvussu tað heila byrjaði.
**Sunnudagin kl. 19.00**



svf

**Dagar við Kathrinu**
Danskur dokumentarfilmur um Kathrine Jacobsen og hennara máta at liva lívið uppá og hennara royndir við sær sjálvari. Í fyrsta umfari er Kathrine helst tað, sum flestøll halda vera ein tapara. Hon er tannleys, er farin um miðjan aldur og brennivínsbarn. Hon fær forsorgarhjálp, og ofta er hon heimleys, og so er hon grønlendingur. Men Kathrine er eitt tað besta menniskja sum er til.
**Týsdagin kl. 23.15**

BBC PRIME

**Fínt skal tað vera**
Skemtiröðin um snobbutu Hyacinth Bucket og kúgaða mann hennara, Richard. Hyacinth og Richard fara at spæla golf í vikuskiftinum saman við The Major. Hetta endar í sonnum ruðuleika.
**Fríggjadagin kl. 19.30**

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**